


# Meinigheitin í Hoyvík eitur nú Fríkirkjan Oasan

FRÍKIRKJA

*Eirikur Lindenskov*

Tann millum manna so kenda Meinigheitin í Hoyvík fær nú nýtt navn. Hon fer nú at eita »Fríkirkjan Oasan«.

Sum ein fylgja av karismatisku vekingini í sjeytiárunum, byrjaðu einstaklingar fyrst í áttatiárunum at savnast til møtir í Hoyvíkar skúla. henda meinigheit varð manna millum kend sum Meinigheitin í Hoyvík, og hevur hon líka síðani havt ymiskt andaligt virksemi, fyrstu árini bæði í Hoyvíkar skúla og í Oasuni í Havn, og nú seinastu tvey æarini í øðrum bygningi Uppi á Brekku 3 í Hoyvík.

– Ásannandi at tað eru fleiri meinigheitir í Hoyvík, er avgerð tikin um, at henda meinigheit framyvir ikki skal eita »Meinigheitin í Hoyvík«, men »Fríkirkjan Oasan«, sigur Jóni Johannesen, sum er fyristøðumaður í Meinigheitini.

Hann sigur eisini, at tey fara at lýsa í dagbløðunum við tiltøkunum hjá Fríkirkjuni Oasuni.

# Ikki løgfrøðiliga bindandi

UNDIRSKRIVT

Ivi hevur verið sáddur um, hvørt avtalan, sum bleiv gjørd millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin í Havn eftir býráðsvalið týskvøldið, er løgfrøðisliga bindandi.

Rás 2 setti hósdagin løgfrøðingum spurningin, og hesir eru sannførdir um, at avtalan, hóast hon er undirskrivað av báðum pørtum, ikki er løgfrøðisliga bindandi, tí talan er um eina reint politiska avtalu.

Ein slík avtala kann ikki nýtast til at trýsta nakað ígjøgnum, siga løgfrøðingarnir.









## KPMG broytir navnið til SPEKT

Av praktiskum grundum hava vit valt at broyta okkara tilknýti til KPMG-International frá fullum limaskapi til eitt leysari tilknýti. Nýggja tilknýtið kallast "Corresponding firm to KPMG International, a Sviss Corporate".

Broytingin er galdandi frá 1. januar 2005.

Størsti parturin av okkara uttanlandssamskifti er við ella umvegis Danmark og hini Norðurlondini. Vit hava eina serliga samstarvsavtalu við KPMG í Danmark, sum heldur fram óbroytt.

Felagið verður frá 1. januar 2005 rikið undir navninum SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.

Nýggja navnið og leysari tilknýtið til KPMG fáa ongan praktiskan týdning fyri okkara kundar, starvsfólk og viðskiftafólk annars. Tær tænastur, sum vit bjóða, halda fram óbroyttar.

SPEKT statsaut. revisorar

Spekt er skynsemi og hygni. At vera skilagóður og umhugsin. Tilsamans umboða hesi orðini tað, sum vit standa fyri.

**KPMG statsaut. revisorar Sp/f**
kpmg@kpmg.fo • www.kpmg.fo

| Tórshavn | Saltangará |
|---|---|
| Staravegur 17 | Heiðavegur 15 |
| Postboks 3258 | Postboks 190 |
| Telefon 34 34 34 | Telefon 474 474 |
| Telefax 34 34 35 | Telefax 474 475 |

KPMG

